# Skiparar og reiðarar fylgja saltfiskinum



13 línuskiparar og reiðarar vóru saman við Egili Johansen og Hanusi Hansen í Spaniu og fylgdu saltfiskinum, sum Kósin framleiðir

**Fiskavirkið, Kósin, hevur saman við línuskiparum og reiðarum í Klaksvík verið í Spaniu og fylgt saltfiskinum, sum Kósin útflytir.**
**- Hetta var ein frálíkur túrur, har veiðiliðið hevur sæð, hvar fiskurin endar, sum verður veiddur og seldur virkjunum, sigur Egil Johansen, innkeypsstjóri á Kósini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í døgunum, 19.-24. september, vóru umboð fyri flest allar línubátarnar í Klaksvík á ferð í Spaniu saman við umboðum fyri fiskavirkið, Kósina.

Tað var Kósin, sum skipaði fyri ferðini og teir, sum vóru við fyri fiskavirkið, vóru Egil Johansen, innkeypsstjóri og Hanus Hansen, stjóri.

Umframt starvið, sum innkeypsstjóri, tekur Egil sær eisini av saltfiskasøluni hjá Kósini, og í hesum sambandi er hann niðri í Spaniu á kundavitjan einar 2-3 ferðir um árið.

### Áhugaðir

- Vit spurdu teir, sum eiga línuskipini, um teir høvdu hug at

koma við okkum niður til Spaniu at síggja, hvar fiskurin endar, sum teir fiska. Jú, tað vildu teir fegnir. Øll línuskipini her norðuri vóru umboðaði á ferðini uttan tað eina, har tað ikki lá fyri at koma við.

Egil sigur, at skipini, sum vóru umboðaði á ferðini í Spaniu, vóru Kvik, Jákup B, Polarstjørnan, Pison og Helena, sum er gamli Fuglfirðingur.

- Vit vóru bara í Barcelona og í økinum nærindis. Her selja vit nógvan saltfisk, og á ferðini sluppu skiparar og reiðarar at síggja, hvat spaniólar gera við saltfiskin.

Egil sigur, at Kósin hevur ein stóran kunda í hesum økinum, sum keypir nógvan saltfisk.

- Her sóu skiparar og reiðarar, at saltfiskafløkini verða útvatnað, skorin sundur og seld hotellum, supermarknaðum og annars á marknaðunum har niðri.

Spurdur, um keyparar har á leiðini ikki bera ótta fyri, at virkini í Føroyum fara at góðska saltfiskin meira, sigur Egil.

- Nei, tað kemur ikki uppá tal. Skulu vit gera tað sama við fiskin, sum tey gera í Spaniu, skulu vit hava stór virkir, nógv fólk og bilar til at røkka somu viðskiftafólkum, sum tey gera har niðri.

Hann vísir á, at Kósin hevur ein kunda, sum keypir nógvan saltfisk. Hesin selir so fiskin útaftur til ein hóp av keyparum, sum keypa úr lítlum upp í stórar nøgdir – ja, heilt úr nøkrum fáum 25 kg. eskjum uppí plattar av saltfiski.

- Tað eru vanliga nógvar og smáar fyritøkur ella persónar, sum keypa og virka fiskin til hotellini, supermarknaðirnar og marknaðirnar annars. Hetta arbeiði verður ikki gjørt á stórum virkjum, men meira í kjallaralíknandi fyritøkum, har lítil og eingin útbúnaður er. Teir hava kanska eina bandsag, sum sker fiskin sundur. Annars eru hetta ikki virkir, soleiðis sum vit kenna tey her heima. Onkur keypir einar 5 eskur, útvatnar fiskin, sker hann sundur og fer síðan á marknaðin at selja, sigur Egil.

Á ferðini í Barcelona fingu umboðini fyri línuskipini høvu at fylgja fiskinum út í seinastu liðini.

### Gott veður

Egil sigur, at veðrið á ferðini var av tí besta.

- Um dagin lá hitin uppí eini 28 stig og um náttina niður í 18. Tað var sól hvønn dag uttan tann eina, tá ið yvirskýggjað var.

Hann heldur, at bæði skiparar og reiðarar vóru stak væl nøgdir við túrin.

- Eg haldi, tað er ógvuliga umráðandi, at veiðiliðið sær, hvussu týdningarmikið tað er, at fiskurin verður so væl handfarin í fyrsta liðnum sum yvirhøvur gjørligt.

Egil vísir annars á, at saltfiskamarknaðurin er rímiliga góður og stabilur, og verður nøkur prísbroyting í næstum, væntar hann, at tað verður hin betra vegin.

- Føroyskur saltfiskur hevur gott orð á sær úti á marknaðinum, og tað er umráðandi, at vit varðveita hesa støðu.

Hann sigur, at føroyski saltfiskurin er hægri í metum enn bæði tann íslendski og norski – og prísirnir, føroysku virkini fáa, er eisini væl betri, enn prísurin, sum grannarnir fáa.

### 3000 tons

Kósin í Klaksvík virkar saltfisk úr toski, longu og brosmu, men tað er toskurin, sum er hin berandi vøran. Lítil og eingin saltfiskur verður virkaður úr upsa í løtuni.

- Okkara samlaða saltfiskaframleiðsla er eini 3.000 tons um árið, harav umleið helmingurin er fløk og hin helmingurin flaktur fiskur.

Egil Johansen heldur, at føroyingar hava eina betri rávøru enn bæði íslendingar og norðmenn.

- Føroyski toskurin er øðrvísi og betur egnaður til saltfiskaframleiðslu enn hin íslendski og norski, sigur innkeypsstjórin og saltfiskasølumaðurin at enda.




*- Tað er umráðandi, at veiðiliðið veit, hvat verður av fiskinum, sum verður veiddur og seldur virkjunum, sigur Egil Johansen*




*Føroyski saltfiskurin er betur og verður seldur fyri meira pening enn hin íslendski og norski.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Niels Pauli Djurholm 90 ár



Hósdagin 25. september fylti Niels Pauli Djurholm, Kollafirði níti ár. Niels Pauli er føddur á Glyvrum, sonur Hans Djurholm, navigatiónsskúlalærara og skipasýnsmann og Inger f. Weihe av Selatrað. Teir vóru tveir brøður, hann og Lassen, sum doyði í 1992.

Niles Pauli er gifur við Gundu f. Skaalum úr Kollafirði. Tey eiga fýra børn. Ingrið, sum býr í Danmark, Arnóru, Hans og Bjarna. Tey eru øll gift, og eiga Niels Pauli og Gunda átta barnabørn og níggju langabba og langommubørn.

Niels Pauli tók læraraprógv í 1935 og var lærari á Toftum og í Gøtu, áðrenn hann gjørdist lærari í Kollafirði í 1937. Frá 1949 til hann fór úr starvi í 1981, var Niels Pauli fyrstilærari í Kollafirði. Í 1957-58 var N.P. á ársskeiði í Danmark.

Umframt at vera lærari, røkti N.P. fleiri álitisstørv. Frá 1949 og næstu 30 árini var hann organistur í kirkjuni í Kollafirði, umframt, at hann bæði var limur í sóknarstýrinum og meinigheitsráðnum. Niels Pauli var eisini kommunuskrivari í Kollafirði í útvið 30 ár. Í sínum virkna felagslívi, var hann millum teirra, sum stovnaði Kollafjarðar Ítróttarfelag.

## Hanna Olsen 80 ár



Í dag, 26.september, fyllir Hanna Olsen, Stangavegur 24 í Klaksvík, 80 ár. Hanna er ættað úr Norðragøtu, dóttir Nicolinu og Amaliel Jacobsen. Hon er nr. 5 av 12 systkjum - og er elsta systir.

Hon kom sum ung til Klaksvíkar at tæna, og giftist í 1948 við Poul Olsen - Poul hjá Axel, sum doyði í 1980. Tey fingu 3 børn, Martin er elstur, síðani Margith og yngst var Nikolina, sum doyði í 1970.

Sum flestu føroysku kvinnur tá, passaði hon mann, børn og hús. Ì 80-unum og til fyrst í 90-unum arbeiddi hon á Kósavirkinum.

Hann ger ikki háva burturúr sær sjálvari - hon telist millum tey stillu í samfelagnum. Hon er arbeiðssom og hevur altíð havt eitt lætt sinnalag.

Henni verður ynskt hjartaliga tillukku við degnum.

**x**

## Palli Mortensen 60 ár

**Í dag verður tvøramaðurin Palli Mortensen, leiðari á SEV verkinum í Vági, 60 ár**

FØÐINGARDAGUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dag, 26. september 2003, verður Palli Mortensen á Tvøroyri seksti. Palli er leiðari á elverkinum hjá SEV á Oyrunum í Vági.

Palli er sonur Hans og Agnes Mortensen. Systkinaflokkurin telur seks systkin. Hans og Agnes andaðust bæði fyri góðum ári síðani. Stutt var ímillum tey.

- Vit høvdu foreldrini leingi, sigur Palli, sum er giftur Naiu Mols Mortensen og saman eiga tey 3 vaksin børn..

Palli var aspirantur hjá ØK seinnu helvt av sekstiárunum og hetta vardi í 3 ár. Í 1970 til 71 var hann á maskinmeistaraskúla í Esbjerg. Síðani sigldi Palli árini 72 - 73 aftur hjá reiðarínum ØK.

Palli Mortensen fór síðani undir at fáa sær víðkað maskinmeistaraprógv. Hetta tók hann í Keypmannahavn árini 1973-74.

Palli leitaði sær síðani heim til Føroya í 1974, men ætlaði sær avstað aftur út í heim. Men hann bleiv hangandi, tá hann starvaðist hjá Poul Eli Bærendsen, eleltrikara, og eisini var Palli avloysari á elverkinum hjá SEV á Tvøroyri.

Síðst í 1975 fekk Palli fast starv hjá Sev. Verkið í Vági varð bygt í 1983 og Palli fekk starv sum leiðari á verkinum. Hetta starv hevur hann røkt síðani.

Stórar broytingar eru hendar innan útgerðina, ið verkini hjá SEV nýta, hesi árini Palli hevur starvast hjá SEV.

- Nú er alt digitalt. Nýggjur motorur verður júst settur upp her í Vági og hann verður bert stýrdur við eini mús, sigur Palli.

- Eg havi trivist væl. Arbeiðið er spennandi og spennandi er eisini at vera við til útbyggingar. Eisini havi eg trivist væl at starvast í Vági, sigur Palli, sum metir, at SEV sum heild er gott arbeiðspláss.

Tað, at ein skal vera til reiðar, tá harðast leikar á og okkurt er áfatt á verkinum, nervar ikki Palla.

- Útgerðin er so nógv betri nú, so tað er ikki so ofta nakað áfatt longur. Nú eru tað mest linjumenninir, ið eiga tørn, tá veður og vindur gera sítt, sigur Palli.

Er heilsa til tað, so væntar Palli at verða í starvinum, til hann má úr tí sum 67 ára gamal.

- Men eins nógv útbygging verður neyvan, nú hetta við nýggja motorinum er liðugt, sigur Palliog leggur afturat, at tað verður so neyvan meira útbygt í hansara tíð á elverkinum í Vági.

- Gomlu motorarnir eru jú yvir 20 ár, Og so hendi jú tað, at orkutørvurin vaks. Men kreppa rakti vinnulívið í Vági aftyr fyri stuttum, so tað fánaði aftur. Nýggi motorurin er 4,2 mw og teir báðir gomlu er uppá 2,5 mw, sigur Palli, sum er burturstaddur sjálvan føðingardagin.



*Palli Mortensen avmyndaður frammanfyri nýggja motorinum á elverkinum í Vági, ið júst verður settur upp. Í dag, 26. september, verður Palli seksti*

*Mynd: D. Olsen*

## Dagurin

**26. september. Adolf,** deyður í umleið 824. Sonur muslimskan pápa og kristna móður í Sevilla. Flutti til Cordoba í vón um at hava kristnu trúgv sína í friði, men varð klagaður og tikin av døgum.
Týskt navn ið merkir *aðalborin* ella *úlvur*.

Ásla Poulsen:

## Barnatannlækni í Havn í 30 ár

31. oktober 2003 er seinasti arbeiðsdagur hjá Áslu Poulsen barnatannlækna hjá Tórshavnar Kommunu.

Ásla er født í Keypmannahavn 12. september 1936. Foreldrini vóru: Sigrid, f. Johannesen, av Torlabrúgv í Funningi, og Hans Pauli Mouritsen, ættaður úr Sørvági. Tey fóru bæði sum ung til Danmarkar og komu saman har, hon gekk á háskúla og hann sigldi.

Ásla varð útbúgvin sum tannlækni á sumri 1960, sum 23 ára gomul.

Hon er gift við Tórbjørn Poulsen, sivilverkfrøðingi og fyrrverandi lands-stýrismanni, úr Havn.

Eina tíð í 60-unum búðu tey í Føroyum men fluttu seinni aftur til Danmarkar, har Ásla arbeiddi sum barnatannlækni í Keypmannahavnar kommunu.

Í oktober 1973 bleiv Ásla sett í starv sum barnatannlækni hjá Tórshavnar kommunu. Hetta starv hevur hon røkt nú í skjótt 30 ár. Hon var formaður í Føroya Tannlæknafelag frá 1993 til 1999.

Áslu dámar væl at ganga í náttúruni, og hevur hon í mong ár verið limur í gongufelagnum í Havn, eisini dámar henni væl at arbeiða í havanum.

Hon fylti 67 ár 12. september 2003, og ynskir hon nú at verða loyst úr starvi hjá Tórshavnar kommunu frá 31. oktober.

Ásla og Tórbjørn eiga fýra børn, tey eru: Guðrið, Marjun, Poul Hendrik og Signar Pauli.

Í sambandi við at Ásla nú gevst sum barnatannlækni hjá Tórshavnar Kommunu, verður móttøka í Hornahúsinum fríggjadagin 26. september millum kl. 15-17.



*Ásla Poulsen, sum hevur verið barnatannlækni í Tórshavnar kommunu, fer nú frá*

*Mynd: Jens Kristian Vang*